# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 26-03-2021

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021**
(Rætting og broyting í atgongd at fiska í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 7 frá 15. januar 2021 um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 4 verður sum stk. 3 sett:
”*Stk. 3.* Kvota sambært stk. 1 kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.”

**2.** § 6, stk. 2 verður orðað soleiðis:
”*Stk. 2.* Kvotan sambært stk. 1 verður latin skipum sum felagskvota og kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.”

**3.** Í § 8, stk. 2 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
”Avlopsnøgdin kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.”

**4.** Í § 9, stk. 2 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
”Avlopsnøgdin kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert